

HEIMURIN *Sagt verður at Tjóðveldisfólk í veruleikanum eru sambandsfólk. Hetta er púra rætt. Men Tjóðveldisflokkurin vil bæði hava samband við Danmark og øll onnur lond. Vilt tú heldur bara hava samband við Danmark?*

# BETRI SAMBAND

Meðan Tjóðveldisflokkurin hevur sitið í landsins leiðslu,
er eitt miðvíst arbeiði gjørt til tess at skapa meira samband millum Føroyar og umheimin.
Innan vinnulív, útbúgving og mentan er samstarv tikið upp við øll okkara grannalond.
Við slíkum samstarvi tvørtur um landamørk byggja vit upp egna vitan og førleikar.
Besti mátin at mennast er at standa í javnari kapping og samstarvi við aðrar tjóðir.
Men nú stendur Sambandsflokkurin til at vinna valið.
Tað merkir, at vit aftur skulu avmarka útheimin til einans av fevna um Danmark.
Men tú hevur møguleikan at forða hesum.
Tú eigur valið millum ófrælst samband við Danmark, ella frítt samstarv við allan heim.

**Ein atkvøða** fyri Tjóðveldisflokkinum
er ein atkvøða fyri

# E

TJÓÐVELDISFLOKKURIN

VEL FRAMTÍÐINA!

www.tjodveldi.fo







## Frið á arbeiðsmarknaðinum

Í farna valskeiðið fingu vi sett sjøtil á at gera uppskot til eina skipan, sum kann viðgera trætumál og spurningar á arbeiðsmarknaðinum við atliti til:

- skjóta viðgerð,
- at samfelagslig áhugamál verða havd í huga, serliga at ósemjur og sáttmálabrot verða loyst í eini rættarskipan.
- at kunna hjálpa tí partinum, sum líður undir sáttmálabroti, at fáa sín rætt og møguliga uppreisn so skjótt sum til ber.

Setti arbeiðsbólkurin, ið varð mannaður við umboðum úr Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Starvsmannafelagnum, Fiskimannafelagnum, Fíggjarmálaráðnum og Reiðarafelagnum, skuldi gera uppskot til broytingar í gomlu semingslógini:

- endurskoða og dagføra lógina sum heild,
- gera uppskotið soleiðis, at lógin fatar um bæði privata og almenna arbeiðsmarknaðin
- og soleiðis, at lógin hóskar til nútíðar føroyska arbeiðsmarknaðin og siðvenju.

Slóðað var fyri einum nýbroti á arbeiðsmarknaðinum, og nevndin var komin væl áleiðis, tá valið varð útskrivað.

Arbeiðið er bráneyðugt, og Fólkaflokkurin hevur sett sær fyri at geva málinum hægstu raðfesting í einari komandi samgongu.

XA

FÓLKAFLOKKURIN

*Ábyrgd, álit og áræði*